TILTØK

Føstugudstænastur Sunnudagin
Kvívík: kl. 17,
Vestmanna: kl. 18.30, David Johannesen
Funningsfjørður: kl. 16,
Elduvík: kl. 18.30, Emil Olsen

Gudstænastur Leygardagin 13. mars
Fríðrikskirkjan: kl. 20, Ungdómsgudstænasta, Tabor-kórið luttekur. Martin R. Jacobsen

3. Sunnudag í føstu
Christianskirkjan: kl. 11, lestur
Mikladalur: kl. 12, altarg., Peter O. K. Olofson
Porkeri: kl. 12, Patrick de Neergaard
Havnar kirkja: kl. 11, Hans J. Joensen biskupur og Bjarni Bæk, dómprostur. Jóannis Fonsdal verður prestvígdur og innsettur, altarg. Talvan gongur fyri Breyðil Heimin
Gøta: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Argir: kl. 11 Familjugudstænasta við Leo-Hans og Sigrun Mikkelsen. Barnakórið syngur
Svínoy: Elsa Funding
Tvøroyri: kl. 11,
Sandvík: kl. 18, Jónsvein Bech
Søldarfjørður: kl. 11, Meinhard Bjartalið

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði, kl. 20 Sangvenjing.
Mikudagin kl. 17.30 Awana fyri børn í 1., 2. og 3. flokki, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru vælkomin.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.
www.ebenezer.fo

Katólska Kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Marcelin Rediu, prestur í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti v/ Justines Poulsen.

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti har Svenning av Lofti talar um evnið: »Gev boðskapin viðari«.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jákup Jacobsen um evnið »Náði Guds í livi Jósefs« og á tilbiðjanarmøtinum talar Bárður Ljósheim um Grønland.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbliutími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina.
www.livdin.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, evnið í ABC: Gud, okkara Faðir. 2. partur v/ Preben Hansen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Temamøti v/ Alex O´Campo.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini Møti har Levi Joensen og aðrir tala. Kl. 21 Bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
Mánakvøldið kl. 19 Ungdómstiltak, sum er ætlað ungdómi (5.-10. flokk).
www.hebron.fo

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Fríggjakvøldið kl. 20-22 verður JC-Teens.

Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Biðið verður fyri sjúkum.
www.rhema.fo

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Regin Olsen.

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Leygardagin »Familjudagur«. Vit hittast í salinum kl. 16.00 (tilmeldan á tlf. 312189).
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti har Ragnar Ludvig talar. Øll eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jógvan Steintún.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikudagin kl. 7 bønarmøti.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti við David Bech og kl. 18.00: Evangeliskt møti við David Bech. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: Bíbiltími við Duritu Tausen.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Nicolinu og Erland Beder, presti.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum
14. mars Møti v/ Ingolf Johannesen.

Kvívík
Missiónsvikan heldur áfram í Glæmuni í kvøld kl. 20 við Meinigheitskósinum úr Havn.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta og kl. 17 Føstugudstænasta við David Johannesen, presti.

Missiónshúsið í Miðvági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við luttøku úr Vík og Tjørnuvík. Hjartaliga vælkomin.

Kollafjarðar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli fyri alla familjuna, har Laila Højgaard verður við.

Saron, Vestmanna
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18 við Fríðbjørn Poulsen. Opið hús fyri ung verður mánakvøldið kl. 20.00. Verið hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús, vitjan frá Levende Ord, Bergen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj, barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Nerija á Skála
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 luttekur sangbólkurin SALT. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30.

Elim, Søldarfjørður
Osvald Kjærbo og Jógvan Edvard Joensen tala á evangeliska møtinum sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

BRÚDLEYP

Leygardagin 27. mars kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Heidi Nónklett Jacobsen, Glyvrar og Páll Jacobsen, Saltangará. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tilmelding á tlf. 447547 ella 448355. Seinasta freist at tekna seg er 17. mars.

Leygardagin 3. apríl kl. 13.30 giftast í Betesda Olanta Højsted Isaksen og Eskild Norðbúð, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður í Betesda kl. 18.30. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 456515 ella 251375 innan 13. mars. Øll eru hjartaliga vælkomin.

3. apríl giftast Terese Johnsson, Kollafjørður og Thomas Andersen, Keypmannahavn í Cafékirken, Suomisvej 5, Frederiksberg C, kl. 14.00.
Brúdleypsadr.: Sonnerupgaard Gods, Tølløsevej 53, 4330 Hvalsø.

Mikudagin 7. apríl kl. 15.30 giftast í Tvøroyrar kirkju Malan Danielsen, Trongisvágur og Dia Petersen, Hov. Veitsla verður um kvøldið kl. 19.00 í skúlahøllini í Trongisvági. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, vera biðin at boða frá áðrenn 20. mars á tlf. 321817 ella 229654.

Leygardagin 10. apríl giftast Rannvá Barbara Poulsen og Helge Joensen, bæði av Tvøroyri. Vígslan verður í Tvøroyrar kirkju kl. 16.00. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í høllin í Trongisvági kl. 19.00.

Leygardagin 24. apríl kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Óluva Archibaldsdóttir, Tórshavn og Klavus Bjartalið, Klaksvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp kunnu ringja á tlf. 455343, 225825, 456489 ella 457284 í seinasta lagi 10. apríl.

SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 24. mars hava Bergfrið og Johan Sørin Berg, Hvalba, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Roynhøllini leygardagin 20. mars kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá á tlf. 375656 ella 282456 áðrenn 14. mars.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 13. mars Skála tlf. 44 14 90
Sunnudagin 14. mars Gøta tlf. 44 10 86

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

men um tú ert nakað mentur, tá miskunna okkum og hjálp okkum.« Men Jesus segði við hann: »Um tú ert mentur! Alt er møguligt fyri honum, sum trýr.« Í stundini skar barnsins faðir í róp og segði: »Eg trúgvi; hjálp tú vantrúgv míni!«

Mark. 9, 22b - 24.

Samanhangurin fortelur okkum um ein mann, sum kom til Jesus við sínum sjúka syni, og biður um hjálp. Hann hevur roynt lærusveinarnar, men teir megnaðu tað ikki. Tí sigur hann við Jesus: »Men um tú ert nakað mentur, tá miskunna okum og hjálp okum.«

Tá er tað, Jesus svarar manninum: »Um tú ert mentur! Alt er møguligt fyri honum, sum trýr.«

Tað er m. a. hetta svarið hjá Jesusi, sum av nøkrum verður nýtt sum grundgeving fyri, at bara vit trúgva og biðja nóg nógv og sterkt nokk, so er einki ómøguligt fyri okkum. Og fáa vit ikki tað vit biðja um, ja so er tað okkara trúgv tað er nakað í vegin við. Tey eru mong, sum hava fingið stein lagdan oman á byrðu, sum var meira enn tung nokk frammanundan.

Men er tað nú mansins trúgv, ella vantandi trúgv, Jesus við hesum peikar á? Hyggja vit nærri at Jesu svari, sum fekk mannin at rópa: »Eg trúgvi, hjálp tú vantrúgv míni!« so kann tað skiljast sum um Jesus loftar orðunum hjá manninum: Um tú ert mentur! Men tú í hesum førinum er Jesus sjálvur, og tí er eisini seinna helvt av svarinum galdandi Jesus: Alt er møguligt fyri honum sum trýr. Eg trúgvi, lat tað vera nóg mikið fyri teg.

Og tað er hesum maðurin við sínum svarið grípur fatur í: »Eg trúgvi, eg líti á, at vilt tú hjálpa, ja so kanst tú eisini gera tað, hví ivaðist eg í hesum, hjálp míni vantrúgv. Soleiðis yvirgevur hann seg í Jesus hendur og letur hann avgera, hvat víðari skal henda.

Orðini, sum í NT verða umsett at trúgva á Jesus, kunnu umsetast Jesu trúgv. Hesar báðar vendingarnar eru ikki mótsetningar, soleiðis sum tær kanska ljóða í okkara oyrum. Men í veruleikanum eru tvær síðir av somu søk. Tí tað at trúgva á Jesus er at geva seg yvir til hansara, so at hann letur alt tað, sum er galdandi seg, eisini gerast galdandi okkum, at tað er hann, sum ber okkum og heldur okkum uppi. Tí verður hann eisini nevndur trúarinnar upphavsmaður og fulkomnari.

Trúgvin og harvið eisini bønin eru ikki eginleikar við okkum, sum gera okkum før fyri at stýra Gudi, so vit kunnu fáa og náa tí, vit ynskja. Men at trúgva og biðja tað er at finna inn hagar, har vit tora at lata Gud vera Gud.

Alt hava vit loyvi til at koma til Guds við. Alt hava vit loyvi til at leggja fram fyri hann og biðja hann um. Og lyftini, sum knýtt eru at bønini, skulu vit ongantíð ivast í. Men svarið hann gevur, er ikki altíð tað vit ynskja okkum mest, men altíð tað, sum gagnar okkum best. At trúgva og biðja er ikki altíð at fáa tað, vit vilja, men at finna frið í tí, at eg eri við heila mær og øllum tí, sum mítt er í Guds vilja. Men tá eri eg eisini í góðum hondum.

Tú best mær tørv og trongd,
o, Drottin, kennir,
hartil øll lívsins gongd,
frá tær upp rennur,
og hvat mær gagnar best í lut at fáa,
frá fyrndini tú sá,
mín sál, hvat bilar tá?
Lat Gud bert ráða!

Jónsvein Bech, sóknarprestur

TILTØK

Nebo, Toftir
Á fundinum sunnudagin kl. 11.30 talar Osvald Kjærbo.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.jesus.fo

Bønhúsið í Søldarfirði
Gudstænasta sunnudagin kl. 11 v/Meinhard Bjartalið, sóknarpresti. Sunnudagsskúli verður sum vant kl. 13.30. Á møtinum kl. 18 luttekur húsbólkur av Glyvrum, har Sigga Skoradal innleiðir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Aglow-møti
verður í Stranda sentrum leygardagin kl. 15. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

Lívsins Orð, Saltangará
Sunnudagin kl. 10.30 Møti, Tim 5 verður mánadagin kl. 17.30 og ungdómsmøti kl. 20.

Missiónshúsið í Gøtu
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor, kl. 18 Møti.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 17 Familjumøti, Ungdómsmøti kl. 21. Vitjan av næmingum úr bíbliuskúlanum á Bildøy.

Getsemane, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti.

KFUM og K, Klaksvík
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Aksel Zakariasen. Kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, fríur vitnisburður.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 Barnarbeiði 1.-6. fl. Kl. 19 Ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 11 Møti við Arnu Lognberg og Evangl. møti verður kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jeannu og Mouritz Viderø. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Um Gud vil byrjar missiónsvikan týsdagin 16. mars kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eingrím Holm talar. Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Bygdarhúsið í Lopra
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 15. mars
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Myndaveving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Týsdagur 16. mars
kl. 10-11.30 Felagssangur við skúlabørnini »á loftinum«
kl. 14.30 Málprát. Jóhan H. W. Poulsen
Mikudagur 17. mars
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Vitja framsýningina í Smiðjuni í Lítluvík
kl. 17-21 Opið hús
Hósdagur 18. mars
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
Fríggjadagur 19. mars
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – Gongutúrur
Sunnudagin 14. mars verður gongutúrur. Kirkjubøreynvestursíðan. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Miðal túrur. Gingið verður í 3 tímar. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 15. mars
Vit lesa seinasta brot úr skaldsoguni Lognbrát eftir Heðin Brú
Mikudagin 17. mars:
vit fara at spæla Boccia.
Byrjað verður kl. 14 á virkinum á Sandi. Vit byrja við løttum fimleiki og síðani verður kappingin millum reyða og bláa liðið tikin upp aftur. Boccia er eitt lætt og stuttligt spæl, har øll kunnu luttaka.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 15. mars
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 16. mars
Ítriv fyri áhugað
Mikudagin 17. mars
Prát og sangur
Hósdagin 18. mars
Opið hús
Fríggjadagin 19. mars
Stongt.

Tú fært altið ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks. Ver hjartaliga vælkomin í Fløvan.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmoðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00 Sunnudag: kl. 11.00–12.00. Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir
postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Heilafelagið
felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu:
javni@post.olivant.fo har tit altið eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

21. - 24. apríl 2004

Kom við til Moskva

... á spennandi fiskivinnumessu



Kom við til Moskva á spennandi fiskivinnumessu 21. - 24. apríl 2004
Beinleiðis til Moskva við Atlantic Airways
20. apríl Vágar - Moskva kl. 14.00
24. apríl Moskva - Vágar kl. 23.55

Prísur: fyri hvønn á dupultkamari 12.745,-
á einkult kamari 13.690,-
Við í prísinum er flogferð, hotel, útferð, visa og ferðaavgjald.
Ferðin verður gjøgnumført um nóg nógv tekna seg.
Tilmelding: seinast 22. mars 2004

úr bara 12.745,- fyri hvønn

Cosmos: www.hotelcosmos.ru
www.amscort.ru/fish/eng/index.htm
Menningarstovan: www.trade.fo

ATLANTIC AIRWAYS
FLOGFELAG FØROYA

Áarvegur 6 · Tel 34 00 00 · marita@ff.fo · www.ff.fo